


# Mærsk setir fleiri í starv, samstundis sum onnur koyra fólk heim

**Jógvan Hugo Gardar**

30.10.2014 - 09:30

Oljan.fo

Meðan tey flestu oljufeløgini royna at minka um talið á starvsfólkum á norska landgrunninum, so velur Maersk Drilling at seta fleiri fólk til oljuvirkse,mi á norska landgrunninum.

Stjórin í Maersk drilling, Claus V. Hemmingsen, sigur í samrøðu við Stavanger Aftenblad, at tey angra einki.

- Okkara mál er at styrkja um okkara støðu í norsku oljuvinnuni. Tað er ein ætlan sum vit halda fast við, óansæð hvussu støðan er í oljuvinnuni akkurát nú, sigur hann.

Boripallurin Maersk Interceptor verður doyptur í næstu viku. Hetta er ein av fýra boripallum sum fyritøkan í 2011 segði at hon skuldi hava. Hesir kosta tilsamans einar 15 milliardir krónur. Samstundis skuldi Maersk Drilling hava fýra boriskip, og kostnaðurin er nakað tað sama sum fyri pallarnar. Tað vil siga at talan er um eina samlaða íløgu um 30 milliardir krónur.

Teir fýra boripallarnir, sum eru bygdir í Singapore, eru leigaðir út til Statoil, BP, Total og DNO. Fyri at manna teir fýra pallarnar á norska landgrunninum hevur Maersk Drilling brúk fyri eini 900 starvsfólkum